# Johannes Andreasen: Tað var langt úti

Matvøruhandilin Johannnes Andreasen við Grønlandsvegin er ein av elstu og best kendu handlum í Havn. Handilin, ið hevur verið við Grønlandsvegin síðan 1950, hevur røtur heilt aftur til 1933, tá Johannes Andreasen byrjaði at handla í Tróndargøtu.

Handilin hevur alla tíðina fylgt við tíðini og er m.a. kendur fyri sín døgurðamat, sum verður seldur út av húsinum. Gólvíddin í handlinum er nógv økt, síðan latið var upp í 1950.

Orsøkin til at býarparturin verður nevndur "úti í Grønlandi" sigst vera, at hann lá so langt burtur frá gomlu Havnini. So tá keypmaðurin Johannes Andreasen bygdi nýggjan handil har, var tað hildið at vera langt úti. Húsini har um leiðir stóðu ikki so tøtt tá, men so hvørt sum fleiri hús løgdust afturat í grannalagnum, vaks kundagrundarlagið hjá handlinum.

Johannes rak handilin til 1957, tá sonurin Arne Andreasen tók yvir. Síðan 2000 hava synirnir hjá Arna, Per og Kári, átt og rikið handilin, sum sostatt í dag verður rikin av triðja ættarliði.

*mg.*







JÓL Í MIÐBÝNUM

Hósdag syngur Cantabilé runt um í býnum frá kl. 18

Knarkar spæla jólatónleik í Tinghúsgarðinum kl. 19.30

Handlarnir hava opið til kl. 20

Fríggjadagin koma Angela og Hannibal í jólasmátturnar kl. 10.30

Frelsunarherurin spælir jólatónar kl. 18

Tórshavnar Kamarkór syngur runt um í miðbýnum kl. 19

Handlarnir hava opið til kl. 21, tó Handilskjarnin til kl. 20.

Jólamenn vitja jólasmátturnar hvønn seinnapart, og í handlunum í miðbýnum

Fleiri tiltøk eru á www.kunning.fo og www.torshavn.fo

KUNNINGARSTOVAN

Telefon 30 24 25



















